# Kjak



Jógvan við Keldu

## Cameron-ætlan í Føroyum hevði givið 400 færri í almenna geiranum

*At almennu fakfeløgini krevja lønarhækkan í hesum døgum, er vandamikið, tey fáa lítið og onki burtur úr, tá skattur og avgjøld eru tikin, men lyftini í leysum lofti, serliga frá "nýuppkomlingum" av politikarum, eru óðamannaverk*

Í framhaldi av grein míni seinastu viku, "Eru Føroyar spakuliga á veg hagar kommunisman slepti", fari eg at geva frá mær onkrar hugmyndir av álvarseminum, nú almennu fakfeløgini ikki aftrað seg við at krevja hægri lønir samstundis, sum politikarar geva lyfti í leysum lofti.

Sera kostnaðarmikið er at liva í Føroyum. Torført er at reka almenna geiran, av hesi orsøk eru skattur og avgjøld støðugt hækkandi, tað ger, at framleiðslukostnaðurin gerst vanliga alt ov tungur, ja so tungur, at versnandi støða er í kapping til útflutnings, harafturat er lítil peningur til marknaðføring og fjarlagni vigar nógv.

Almenni lønmóttakarin átti at tikið hetta í nógv størri álvara. Torført er at vera politikari í dag við stórum krøvum og ongum pengum, hóast flestu sjálvir eru komnir sær og okkum øðrum í hesa støðuna. – Skortað hevur ikki verið uppá ávaringarnar.

### Evropa í sama báti

Ikki bara í Føroym er hendan næstan óloysiliga støðan, men stórur partur av Evropa er í sama báti.

Í tíðindabrævi frá danska miðdeplinum fyri politiskum kanningum CEPOS, varð víst á víðfevndar avgerðir, sum forsætisráðharri Onglands, Cameron, er noyddur at taka.

Henda ætlanin er, at í 2015 skulu 490túsund alment lønt verða tikin úr alemenna geiranum. Hetta svarar til eini 44túsund í Danmark, ella 8-9túsund árliga sjálvboðin natúrliga fara av almenna arbeiðsmarknaðinum.

### Føroyar sleppa ikki uttanum

Taka vit nú rokniarkið fram, sum okkara akademikarar ofta eru óførir til, tá teir skulu sannføra onnur, so skuldi hetta í Føroyum svara til íalt eini 400 fólk úr almenna sektorinum, tá 2015 er runnið. – Hetta kann uttan iva gerast við natúrligari frágongd.

Núverandi fíggjarmálaráðharrin var løgmaður, tá "Visjón 2015" var kjølsett, og sera errin av henni. Sjálvur var eg ongantíð heitur talsmaður fyri henni, tí sum eg tá segði, eitt er at hava eina dreymasjón, annað er eina visjón, sum drúgvt, áhaldandi og nærlagt arbeiði skal leggjast í.

Tað sum Cameron nú ger í Bretlandi, metir CEPOS er neyðugt at gera í Danmark, tað hevði spart Danmark fyri einar 22 milliardir krónur. ella brúka vit aftur rokniarkið, so hevði hetta spart minst 200 mió. krónur í Føroyum. – Hetta sleppa Føroyar í longdini ikki uttanum. Tess skjótari hetta verður framt, so mikið lættari, heldur enn at "tosa" um flosklarnar "bygnaðarbroytingar", sum hava verið uppi og vent seinastu 25 árini, tá onki annað er at taka til, og sum um tað við teimum henda undurverk. Sjálvandi eru hesar eisini neyðugar, men muna onki einsamallar.

At almennu fakfeløgini krevja lønarhækkan í hesum døgum, er vandamikið, tey fáa lítið og onki burtur úr, tá skattur og avgjøld eru tikin av, men lyftini í leysum lofti, serliga frá "nýuppkomlingum" av politikarum, er óðamannaverk..

---



Eyðun Mohr Viderø

## Kommunustýrisformenn við ongari framdrift!

Nú gerst meir og meir viðkomandi, at neyðugt verður - serliga hjá smærri kommunum -at leggja saman í størri eindir.

Samfelagsumstøðurnar hava lagað tað so, at so hvørt, kommunurnar ynskja at taka í sítt vald almennar umsitingar, ið landið higartil hevur havt um hendi, so skal ein ávísur førleiki til á lokalu økjunum.

Hjá lítla økinum "Sandoyar Sýsla" hevur hetta kenst avmarkandi. Fólkatal og skattaborgarar eru heldur fá, og tí er fíggjarorkan avmarkað. Men sjálvt um fólkini eru fá, so er umsitingarliga uppgávan ikki minni av tí.

Tær einstøku uppgávurnar skulu røkjast eins fyri hundrað sum fyri túsund!

Tí setir tað eisini nøkur krøv til politikkarar í hesum lítla øki, um lítla samfelagið skal yvirliva!

Fyri umleið 10 árum síðan var eg virkin í kommunupolitikki. Bar mangan fram um kommunusamanlegging, bæði her í oynni, og á fundum hjá t.d. kommunufelagnum.

Her á oynni komst ikki longur tá, tí allar kommunurnar, uttan Sands, vildu ikki leggja saman. Hinar sóu ongan fyrimun!

Tosað varð um stóru skuldina hjá Sands kommunu, men ikki tey gagnligu virðini, ið treytaðu hesi lán! Sjálvsagt havnin á Sandi.

Minnist, at Gerhard segði mær, at eitt samt bygdarráð í Skopun ikki ynskti samanlegging!

Nú byrjar at treingja saman um. Kommunur verða helst innan stutta tíð noyddar at leggja saman í størri eindir.

Um eg var virkin kommunalpolitikkari í dag, so hevði eg havt somikið av "ambitiónum" at vilja gjørst komandi felagsformaður! Men tað setti sjálvsagt sum treyt, at eg hevði ætlan og vilja til framtíðina hjá felagskommununi, hvussu hetta økið skuldi skipast. Ikki bert fyri størru bygdirnar, men fyri alt økið!

Sandoyar sýsla er jú eitt náttúrligt og samanhangandi øki.

Nú síggi og hoyri eg, at formenninir á Húsavíkar og Skúvoyar kommunum heldur vilja skilja seg frá okkum og fara inn í Havnar kommunu!

Ikki fyri at "fáa frá Havnini"?? at hon gjalda nakað fyri hesar, men tí hesar smáu bygdir annars verða gloymdar av størru bygdunum í Sandoy!?

Báðar smáu kommunur hava gjørt ella eru í gongd við at fáa hóskandi lógilt vatnverk, kloakskipan v.m., so har hava tær ikki fyri neyðini at "fáa" nakað!

At vera virkin í politikki er altíð ein avbjóðing.

Ongin er fullkomin, men tá tú bjóðar teg fram, so hevur tú ávís mál í samfelagnum, tú ætlar at náa!

Formenninir í lítlu kommununum hava innanhýsis ongar fíggjarligar trupulleikar, sum ein komandi innliman í Havnar kommunu skal loysa!

Sjálvur siti eg eftir við ásannan um, at er politiskur vilji og ábyrgd so einfald, so má ásannast eins og við báti á sjónum: Er ongin framdrift, so er heldur ongin róðurmegi, og so stýrist ikki!